# NIÐURBRÓTANDI AT FRYSTA PENSJÓNINA

**PENSJÓNSHÆKKING** Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við ætlanini hjá Rósu Samuelsen um at strika automatisku hækkingina í pensjónini

Áki Bertholdsen

– Ætlanin hjá Rósu Samuelsen at avtaka skipanina, har almannaveitingar hækka automatiskt hvørt ár, er niðurbrótandi og beinleiðis harðrent.

Tað heldur Hans Pauli Strøm, talsmaður hjá Javnaðarflokkinum í eldramálum.

Sum støðan er nú, hækka almannaveitingar automatiskt hvørt ár fyri at leggja upp fyri príshækkingum.

Men nú ætlar Rósa Samuelsen at avtaka hesa automatisku framskrivingina fyri at spara 12 milliónir krónur.

**Brýtur niður**

Hans Pauli Strøm sigur, at hetta er at bróta pensjónsskipanina niður og hetta er eisini at bróta niður álitið ímillum politisku skipanina og borgararnar.

– Tað minnir meiri um eitt revistiltak enn um eitt uppbygjandi tiltak.

Hann sigur, at hetta er eisini í mótstríð við ætlanina í komandi pensjónsreforminum.

Sostatt ger hann nú púra greitt, at hetta er ikki ein ætlan, sum Javnaðarflokkurin kann taka undir við.

## » Hetta er burtur úr vón og viti

HANS PAULI STRØM

Í staðin fyri at avtaka alla hækkingina í bæði fólka- og fyritíðarpensjonistum, eiga vit at seta eina nýggja javningarskipan í gildi, sum tryggjar, at pensjónirnar bæði fylgja við broytingunum í sáttmálalønunum og við prístalinum, sigur talsmaðurin hjá Javnaðarflokkinum.

Hann sigur, at hetta kann gerast soleiðis, at fyri hvørt ár verður eitt javningartal roknað út, sum er eitt miðaltal av lønar- og prísvøkstrinum árið fyri.

– Sum nú er, verður bara viðbótin í fólkapensjónini hækkað 3%. Grundupphæddin, sum er tann størri parturin av fólkapensjónini, verður als ikki rørd. Hetta merkir, at tilsamans verður fólkapensjónin bara hækkað eini 1,25%.

Hjá fyritíðarpensjonistum verður øll pensjónin hækkað 3%.

**Fylgja gongdini**

Hann hevur eisini gjørt eitt roknistykki, sum vísir, hvussu pensjónirnar høvdu hækkað í ár, hevði hansara uppskot verðið sett í verk, tvs. um pensjónirnar høvdu verið hækkaðar eftir einum miðaltali av lønarhækkingini og prístalinum í 2009?

– Hækkingin av lønarsáttmálunum er 3%. Samstundis lækkaði prístalið úr 116,7 í 2008, niður í 115,5 í 2009, ella 1,0%.

– Miðaltalið av lønarhækkingini og broytingini í prístalinum hevði sostatt verið miðaltalið av 3% og -1%. Eftir hesum gøvdu pensjónirnar í ár hækkað 1%.

Hann hevur eisini mett um, hvussu hækkingarnar høvdu verið næsta eftir hesum leisti.

– Taka vit sáttmálan á privata arbeiðsmarknaðinum sum dømi, so fingu tey eina hækking uppá 3,8% tilsamans hesi næstu tvey árini. Tað er 1,9% m árið.

Taka vit prístalið, kenna vit higartil bert 1. ársfjórðing í 2010, men samanbera vit við 1. ársfj. Í 2009, er tað fallið úr 116,1 niður í 115,2, ella 0,8%.

– Eitt miðaltal av broytingini í lønarsáttmálum og prístalinum hevði tí verið 0,55%. Høvdu vit eitt annað ár havt ein lønarvøkstur upp á 2% og prístalsvøkstur uppá 3%, høvdu pensjónirnar verðið hækkaðar við einum miðaltali av tí, nevnliga 2,5%.

Hans Pauli Strøm sigur, at á henda hátt hevði borið til at tryggja, at pensjónirnar altíð fylgdi gongdini í samfelagnum, sum hon avmyndast í lønar- og príshækkingunum.

Hann sigur eisini, at hetta er í samsvari við ætlanirnar í nýggju pensjónsskipanini, sum ætlanin er at seta í gildi.

– Tað hevði verið svik móti pensjónistunum at arbeiða við eini skipan við aðrari hondini og so at máa støðið undan henni við hinari hondini, sigur Hans Pauli Strøm.

**Skotið niður**

Men í frágreiðingini, sum varð løgd fyri Løgtingið tá ið játtanarkarmurin var fyri, stóð, at automatiska hækkingin í pensjónunum skuldi hækka.

– Ja, men tað stendur eisini, at tað skuldi tengjast saman við gongdini í lønarlagnum. Nú hava arbeiðarafeløgini fingið lønarhækking og tí ivist eg ikki í, at tey alment løntu eisini fáa eina lønarhækking. Sostatt er grundarlagið undir ætlanini burtur og tí er tað óhugsandi, at pensjónirnar skulu standa í stað, sigur Hans Pauli Strøm.

## 35 PLÁSS SPARAST BURTUR

**Nú fýra nýggj ellis- og røktarheim skulu byggjast, hevur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, skotið upp, at niðurleggja 35 pláss á sambýlum og ellis- og røktarheimum kring landið. Í Suðuroy skal eitt samýli til fimm fólk niðurleggjast á Tvøroyri og harafturat skulu átta tveymanskømur á ellis- og røktarheiminum niðurleggjast og øll tey 13 fólkini skulu flytast suður á nýggja ellis- og røktarheimið, sum verður bygt í Vági.**

**Búfólkini á teimum stovnunum skulu síðani flytast á tey nýggju heimini, sum nú verða bygd. Sum vit greiddu frá í Sosialinum mánadagin, er talan um fólk, sum búgva í sambýlum, ið ikki verða mett at vera so væl egnað. Talan er eisini um fólk, ið búgva á tveymanskømurum á ellis- og røktarheimum, tí Rósa Samuelsen heldur, at nú á døgum er tað ikki mansømiligt at eldri tvey fólk, sum nki hava við hvørt annað at gera, skulu tvingast búgva tvey saman á einum kamari.**

## 136 PLÁSS

**Hans Pauli Strøm staðfestir, at í løtuni eru fýra ellis- og røkarheim í gerð í løtuni kring landið. Í Vági skal eitt ellis-og røktarheim til 24 fólk takast í brúk næsta vár og somuleiðis skal eitt heim til 24 fólk í Vestmanna takast í brúk næsta heyst. Harafturat verður eitt heim bygt í Klaksvík til 24 fólk og tað verður liðugt í 2012. Og í Havn, har tørvurin er størstur, verður eitt heim bygt til 64 fólk og eisini tað verður liðugt í 2012.**

**Um gott tvey ár verða sostatt 136 búpláss til eldri klár at taka í nýtslu.**

**- Tað svarar akkurát til at nøkta tann bráðneyðuga tørvin. Men ketan leypir fullkomiliga av, tá ið vit við aðrari hondini skulu spara 35 búpláss burtur, ssamstundis sum vit við hinari hondini leggja politiska orki í at byggja eldraøkið út, sigur Hans Pauli Strøm.**

# Kann sova púra róliga

– Kirstin Strøm, borgarstjóri í Vági, kann sova púra róliga.

Tað staðfestir Hans Pauli Strøm, talsmaður Javnaðarfloksins í eldramálum.

Í Sosialinum mkudagin var Kirstin Strøm Bech so fortørnað inn á uppskotið um at niðurleggja 35 eldrapláss – harav 13 pláss skulu niðurleggjast í Suðuroy – at hon gjørdi púra greitt, at tekur Javnaðarflokkurin undir við hesum, fer hon av álvara at umhugsa at melda seg úr flokkinum.

Men Hans Pauli Strøm ger púra greitt, at borgarstjórin í Vági skal taka tað púra róligt, tí hetta kemur ikki upp á tal.

– Kirstin Strøm Bech hevur eisini fullkomiliga grein í sínum máli, tá ið hon følir seg lumpaða av hesum uppskotinum hjá Rósu Samuelsen, sigur

– Tær fýra kommunurnar í suðuroyar syðru helvt hava spent seg hart fyri figgjarliga við stórari lántøku fyri at loysa ein bráðneyðugan tørv á eldraplássum.

Endamálið við hesi íløguni var at útvega 24 nýggj búpláss til eldri.

– Tí má tað ómøguliga henda, at grundarlagið verður tikið undan hesi íløguni í Vági, tí verður uppskotið hjá Rósu Samuelsen sett í verk, verða 13 pláss samstundis niðurløgd og sostatt fáa kommunurnar í suðuroyar syðru helvt bara 11 nýggj búpláss burturúr hesi stóri íløguni.